# Karl Gustav Ljunggren

* 6. desember 1906. † 11. juni 1967.



Karl Gustav Ljunggren professari við lærda háskúlan í Lund í Svøríki andaðist 11. juni 1967, 60 ára gamal.

Hann varð borin í heim 6. desember 1906 í Halmstad í Hallandi. Hann gjørdist magistari við lærda háskúlan í Lund 1927 og lisentiatur trý ár eftir. 1932 fekk hann doktaranavnbót og varð skipaður dosentur í norðurlandamálum. Trý ár var hann í ritstjórnini á Svenska akademiens ordbok. 1940 varð hann professari í svenskum máli í Lund eftir at Emil Olsen fell frá. Í hesum starvi sat hann meir enn 26 ár.

Sum málfrøðingur var Ljunggren sera víðfevndur. Setningafrøði, orðasøga og staðanavnarannsóknir vóru tey evni, sum høvdu mestan áhuga hansara.

Doktararitgerðin bar heitið »Studier över förhållandet mellan verbal-

partikel och verb i fornsvenskan« (1932) har sum hann lýsir søguna hjá samansettum sagnorðum í svenskum. Framhald av hesum rannsóknum kom í ritgerðini: »Studier över verbalsammansättningen i 1500-talets svenska« (1937). Eftir hann liggur ótal av málfrøðiligum verkum og ritgerðum bæði um gamalt og nýtt svenskt mál, ið her verður ov langt at telja. Eitt meginverk hansara er útgávan av uppískoytisheftum til Söderwalls »Ordbok över svenska medeltids-språket«; av 31 heftum, ið við deyða hans vóru útkomin, hevur hann ritstýrt teimum 25. Hetta arbeiði gav honum manga tilelving til serrannsóknir av orðum og orðasøgu.

Annað orðabókaverk av heilt øðrum slag eydnaðist Ljunggren at síggja liðugt; tað var »Svensk handordbok. Konstruktion og fraseologi«, ið kom út 1966. Hann var annar høvuðsritstjórin. Stig til at fáa bókina í lag hevði Nämnden för svensk språkvard tikið. Hesi nevnd var hann limur í frá stovningardegi 1944, og frá 1953 var hann varaformaður. Innsetingarfyrilestur hansara 1940 hevði heitið »Språkforskning och språkvård«. Øvut tí sum ættarliðið frammanundan hevði lært, helt hann her fram, at tað ber væl til at sameina málrannsóknir og málrøkt. Hann var íðin í tí virki nevndarinnar, ið vendi móti hinum Norðurlondunum. 1966 fekk hann málrøktarheiðursløn frá Svenska akademien. Hann var ritstjóri á Arkiv for nordisk filologi frá 1944 til deyðadags.

Tann frøðigrein, hann sýndi eina mestan áhuga var staðanavnagransking, og á hesum øki hevur hann lagt slóð eftir seg í føroyskari lærdómssøgu. Summarið 1953 gjørdi hann rannsóknarferð henda vegin og dvaldist tá 3 vikur í Kaldbak. Har savnaði hann saman øll staðanøvn har í sóknini, bæði innangarðs og uttan; høvuðsheimildarmaður hansara var Tummas Reinert bóndi. Úrslitið av rannsóknum sínum prentaði hann í rúgvumiklari ritgerð í Namn och bygd 1956, bls. 116—163 undir heitinum »Ordnamnsskicket i en färösk bondebygd (Kaldbak, Streymoy)«. Fyrimyndin fyri rannsóknini er »Stadnamni i ei fjellbygd« eftir Gustav Indrebö (Maal og Minne 1921 bls. 113—210). Hann tekur øll staðanøvnini til viðgerðar og liðar navnatilfarið sundur eftir høvuðsbólkum. Nakrar av yvirskriftunum yvir greinarlutunum kunnu geva bestu mynd av, hvussu hann handfer evnið: A. Sockennamnet. B. Bebyggelsesnamnen. C. Övrige kulturnamn. D. Naturnamn. Hesin seinni bólkur er, sum vera man, hin størsti. Hann er aftur sundurliðaður í undirdeildir eftir náttúrufyribrigdum og innan fyri hvørja deildina verða nøvnini tikin fyri í stavrøð eftir seinna navnliði. Hann nýtir til fulnar tað, sum menn sum Jakob Jakobsen og Chr. Matras áður hava skrivað um føroysk staðanøvn, men tillag hansara sjálvs til týðingar er eisini virðismikið, tó hendir tað seg onkuntíð, sum ikki løgið er, at hann rakar ikki beint. Men alt samantikið er henda staðanavnalýsing til mikið gagn hjá teimum, sum hereftir fara at viðgera føroysk staðanøvn. Nógv var vunnið, um so fullfíggjað navnayvirlit var gjørt fyri hvørja bygd í Føroyum. Eftir slóðbrótandi verk Ljunggrens er hetta lættvunnari enn frammanundan.

Eina roynd til at greiða hitt gátuføra Velbastaðar-navnið ger hann í greinini »Kirkjubøur, Velbastaður og Tórshavn« í 4. bók av Fróðskaparritum (1955). Hann heldur ikki, at giting dr. Jakobsens, at fyrri liður er mansnavn (*Velbi-), fær hildið, men roynir at gera tað sannlíkt, at bygdarnavnið hevur upprunaliga havt sniðið Vébólsstaður; tílíkt navn hevur verið í Noregi. Við stavaskifti (metatesu) hevur so navnið onkursvegna broytst til Velbastaður. Hann hugsar sær til, at har hevur *vé* ella hov verið, halgað Tóri, og setur navnið Tórshavn í samband við hetta hov. Kirkjan hevur so fingið sær høvuðssæti sítt í nánd við hetta heidna hov, eins og dømi skulu vera um aðrastaðni í Norðurlondum. Her er ikki høvi til at taka hesa greiðing upp til umrøðu. Hvat ið hildið kann verða um hana ella ikki, hetta er higartil seinasta orðið, sum sagt hevur verið um Velbastaðarnavnið. Tó skal verða sagt so mikið, at tað, ið sagt verður um ljóðligu broytingina, tykist ikki fult sannførandi. Men hvussu er og ikki, hetta er ein djørv og hugfloygd roynd til at kasta ljós yvir eitt av torgreiddastu staðanøvnum okkara.

Vit føroyingar skylda hesum mæta frøðimanni tøkk fyri at hann, hóast hann hevði nóg mikið um hendur heima, gav sær stundir at hyggja vestur um hav til okkara og lata okkum njóta av lærdómi sínum og gløggsýni.

*Jóhan Hendrik W. Poulsen.*